


*Enn er tað ikki 100% víst, men vit loyva okkum kortini at útnevna Stjørnuna til fyrsta føroyameistaran í nýggju øldini, og eftir sigurin á VB, hvødu tær heldur einki ímóti at ein liðmynd varð tikin av teimum:*
*Aftast frá vinstru: Karl Johansen, Joan M. Joensen, Sólvá Eystberg, Simona Hansen, Annika Ljósstein, Jastrid Gullaksen, Anna K. Samson, Røgvi Nielsen og Guttorm Sørensen. Fremst frá vinstru Una Olsen, Johanna Mikkelsen, Rannvá Andreasen, Ragna Andreasen og Vesna Tomajek. Framman fyri liggur Andrijana Milodanovic*



# Máltindurin

## 1. deild kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| Ioana Rápa | VÍF | 147 | (44) |
| Regina Rádó | VB | 130 | (35) |
| Vesna Tomajek | Stjørnan | 126 | (52) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 121 | (50) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 88 | (7) |
| Sunrid Gleðisheygg | Tjaldur | 85 | (24) |
| Simona Hansen | Stjørnan | 80 | (8) |
| Arnleyð Krosslá | VB | 79 | |
| Inga F. Danberg | Neistin | 79 | (21) |
| Andrijana Milodanovic | Stjørnan | 76 | (2) |
| Gurið Mortensen | VB | 75 | (3) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 69 | (24) |
| Annika Ljósstein | Stjørnan | 68 | (15) |
| Ann Hansen | Kyndil | 62 | (10) |
| Ileana Manolescu | Neistin | 59 | (13) |



*Jacklin Durhuus er tann føroyski leikarin, sum hevur skotið flest mál hjá kvinnunum*

## 1. deild menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| Sámal Joensen | VÍF | 157 | (29) |
| Heini Joensen | Neistin | 146 | (32) |
| John Petersen | StÍF | 138 | (39) |
| Áki Olsen | Neistin | 127 | (18) |
| Artur Johansen | StÍF | 126 | (24) |
| Ingi Olsen | VÍF | 106 | (7) |
| Petur Martin Johansen | KÍF | 106 | (39) |
| Jakob Jónsson | Kyndil | 105 | (9) |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 105 | (20) |
| Bjarni Wardum | Kyndil | 97 | (24) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 91 | (7) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 85 | (7) |
| Vagnur Johannesen | KÍF | 83 | |
| Suni F. Johannesen | Tjaldur | 82 | (20) |
| Martin Hummeland | VÍF | 73 | |

## Støðan 1. deild kvinnur

| | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 7 | 7 | 0 | 0 | 493 | 383 | 110 | 23 |
| 2 VÍF | 6 | 4 | 0 | 2 | 398 | 356 | 42 | 15 |
| 3 Kyndil | 6 | 3 | 0 | 3 | 382 | 342 | 40 | 13 |
| 4 Neistin | 6 | 4 | 0 | 2 | 346 | 343 | 3 | 13 |
| 5 VB | 7 | 1 | 0 | 6 | 424 | 452 | -28 | 6 |
| 6 Tjaldur | 6 | 0 | 0 | 6 | 285 | 452 | -167 | 0 |

**Stíf hevur tikið liðið úr kappingini**

## Støðan 1. deild menn

| | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 8 | 6 | 0 | 2 | 581 | 457 | 124 | 23 |
| 2 Neistin | 6 | 6 | 0 | 0 | 529 | 450 | 79 | 21 |
| 3 StÍF | 7 | 5 | 0 | 2 | 548 | 472 | 76 | 21 |
| 4 Kyndil | 7 | 5 | 0 | 2 | 539 | 460 | 79 | 17 |
| 5 KÍF | 8 | 3 | 0 | 5 | 453 | 566 | -113 | 7 |
| 6 H71 | 8 | 1 | 0 | 7 | 464 | 568 | -104 | 4 |
| 7 Tjaldur | 8 | 0 | 0 | 8 | 483 | 624 | -141 | 3 |



## Stuðulsfólk/ Hjálparfólk

Søkt verður eftir avloysara fyri stuðulsfólk til 39 ára gamlan lammaðan mann.

Søkt verður eftir avloysara frá 15. mars at arbeiða 36 tímar um vikuna í 1/2 ár. Søkt verður eisini eftir avloysara at arbeiða 24 tímar um vikuna fyribils til 31. mai, og avloysara at heita á og møguliga avloysa í summarferiuni.

Arbeiðið verður gjørt í samstarvi við mannin sjálvan og Almannastovuna.

Ynskiligt er, at tey, ið sett verða, hava hóskandi fakliga útbúgving og/ella royndir frá líknandi arbeiði, at vera um óhjálpin, og ikki eru yngri enn 25 ár. Neyðugt er at hava koyrikort.

Arbeitt verður í skiftandi vaktum.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi skjótast møguligt og í seinasta lagi 6.3.00. Umsóknir skulu vísa til j.nr. 1999-02/1428 og skulu sendast til:

**Almannastovuna**
Minna Jacobsen
Postrúm 196
110 Tórshavn

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Minnu Jacobsen, tlf. 315480.

## Dagrøktarmamma

Søkt verður eftir dagrøktarmammu í Skálavík, at byrja skjótast gjørligt. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Dagrøktina á Sandi, tlf. 361528.

**Dagrøktin í Sands kommunu**


**Hjá okkum fáast vognar og útgerð til allar flutningsuppgávur!**

- **Viðfestisvognar sum lasta frá 325 kg. upp til 2.600 kg. –nógv model!'**
- **Eykalutir til viðfestisvognar**
- **Sekkjavognar, hydr. lyftiborð –arbeiðsbord**
- **Vognar til gassfløskur, oljutunnur, kassar, trappir –óteljandi møguleikar!**
- **Gafflar til heisan av plattum, vøru o.a.**
- **Tip - Ruskkonteinarir til trukkar**
- **Spennireimar og lyftistroppar**
- **Sleipikrókar til øll bilmerki!**

Sosialurin - 311820

*Tosið við okkum!*

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

*Lýsið í* **sosialinum**


## Frisørar

**Treytað av m.a. nóg stórari undirtøku, verður skeið hildið í:**

## Klipping, liting og langthársuppseting

**vikuskiftið 18. og 19. mars 2000**

Innihald: Klipping, liting og langthársuppseting.

Endamál: At vísa luttakarunum tað nýggjasta innan hármóti.

Frálæra/gjald: Demonstratión leygardagin 18.3. kl. 15-18 kr. 500,-
Hold I sunnudag 19.3. kl. 8.30-12 kr. 350,-
Hold II sunnudag 19.3. kl. 13-16.30 kr. 350,-

Skeiðleiðari: Line R. Sørensen frá Frisørskolen í København.

Luttakaratal: Leygardag – óavmarkað
Sunnudag – hægst 12 pr. hold.

Tilmelding: **áðrenn 8. mars 2000.**

Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunninn »VITAN«, kunnu søkja um stuðul haðani.

Fráboðan um luttøku og nærri frágreiðing (eisini um innivist v.m.), fæst við at venda sær til skúlan á tlf. 311957 (mánadagfríggjadag kl. 8-12 og 13-16).

**Tekniski Skúlin í Tórshavn**
Marknagilsvegur 75, Boks 239,
FO-110 Tórshavn, tlf. 311957, fax 316621

## Føroya Psoriasisfelag

Kunngjørt verður við hesum, at næsti viðgerðartúrur fyri psoriasis verður 24. apríl til 19. mai til Bláa Lónið í Íslandi. Tey ið hava tørv á viðgerð, kunnu fara til egnan kommunulæknan, ið so fyllir út umsóknarblað til húðlæknan. Umsóknir skulu vera húðlæknanum í hendi seinast 1. mars.

**Føroya Psoriasisfelag**

Sosialurin - 311820


**MÁLNINGAFRAMSÝNING Í SMIÐJUNI Í LÍTLUVÍK**
**1/3 til og við 6/3 2000**

**Opið er:**
Mikudag til fríggjadag kl. 15.00-19.00
Leygardag ........................ kl. 14.00-20.00
Sunnudag ........................ kl. 14.00-18.00

**Pauli Vang**

Sosialurin - 311820


FÍGGJARMÁLASTÝRIÐ

## FULLTRÚAR

Søkt verður eftir tveimum fulltrúum til Fíggjarmálastýrið. Arbeiðsøkið er sjálvt Fíggjarmálastýrið.

**Í Fíggjarmálastýrinum verður arbeitt við:**
- Játtanarskipan landsins
- Fíggjarlóg og øðrum játtanarlógum
- Kapitalmarknaðarviðurskiftum
- Búskaparanalysum
- Búskaparmodellum
- Toll-, skatta-, kolvetningsskatta- og mvg-lógarfyrireiking

**Starvið**
Fulltrúar í Fíggjarmálastýrinum fáast við eitt fjølbroytt úrval av ráðgevandi, fyrisitingarligum og analytiskum uppgávum á teimum økjum, stýrið umsitur m.a.:
- Ráðgeva landsstýrismanninum í fíggjarmálum
- Lógarfyrireiking og málsviðgerð
- Loysa tvørgangandi og samskipandi uppgávur
- Gera analysur, langtíðarætlanir og tryggja, at hesar verða framdar
- Ráðgeva og leiðbeina aðalstýrum og stovnum

**Førleiki**
Vit hava hugsað okkum, at tú hevur samfelagsvísundaliga útbúgving av hægri lærustovni.

Tú skalt eisini duga at arbeiða sjálvstøðugt og samstarva í arbeiðsbólkum.

**Vit bjóða**
- Starv, sum til tíðir er strevið við longum arbeiðsdøgum, men samstundis sera áhugavert við nógvum samskifti úteftir
- Fjølbroyttar uppgávur, har tú m.a. fert at arbeiða nógv saman við teimum politisku myndugleikunum
- Sjálvstøðugt starv, sum tú ført høvi at vera við til at skapa
- Flex-tíð
- Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar

Arbeitt verður á høgum fakligum stigi, so tað eru góðir møguleikar fyri bæði persónligari og fakligari menning.

Fíggjarmálastýrið heldur til úti á Argjum saman við Føroya Gjaldstovu, Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrinum, Hagstovu Føroya og Lønardeildini hjá Fíggjarmálastýrinum. Talan er sostatt um eitt stórt og spennandi umhvørvi.

Setunartreytir eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og samsvarandi fakfelag.

Viðmerkt skal vera, at setanin fatar um alt Fíggjarmálastýrið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og hini aðalstýrini.

**Umsókn**
Umsóknin við prógvum o.ø. skal verða send:

***Fíggjarmálastýrið***
***Postboks 2039 — FO-165 Argir***

Vit skulu hava fingið umsóknina í seinasta lagi mikudagin 16. mars 2000 kl. 12.00.

Størvini verða sett skjótast tilber.

Vilt tú hava meira at vita um starvið, kanst tú ringja til Petur Alberg Lamhauge, fíggjarmálastjóra á tlf. 35 20 20.